## Margfeldið samtykt

Løgtingið hevur samtykt uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum um burðardygt margfeldi. Í samtyktini heitir Tingið á landsstýrið um at taka stig til at fylgja sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi og at lýsa margfelda lívið í føroysku náttúruni. Løgtingið samtykti sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi longu í 1993. Hetta er ein víðfevndur sáttmáli við nógvum ásetingum, og honum skal landsstýrið fylgja sambært samtyktini í Tinginum.

## Móttøka fyri Sofusi

Tann 1. oktober tók Sofus Clementsen við starvinum sum stjóri í partafelagnum Postverk Føroya. Hann kom úr starvi í Danmark. Í sambandi við starvssetanina skipar nevndin í Postverki Føroya fyri móttøku á Frímerkjadeildini í Traðargøtu 38 á Argjum fríggjadagin 17. november. Móttøkan er frá klokkan 16 til 18. Honon er almenn, og har kunnu viðskiftafólk hjá Postverkinum og onnur heilsa upp á nýggja stjóran.

# Neyvan rætt at leggja Kvívík og Vestmanna afturat Tórshavnar kommunu

**– Landafrøðin er ikki longur tann, hon var, og Kvívík og Vestmanna verða meiri útjaðari í einari uppaftur størri Tórshavnar kommunu, enn tær eru í dag, heldur varaborgarstjórin í Havn**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*– Vit vildu heldur havt greiðar reglur um býtið millum landið og kommunurnar enn harraboð um at leggja meiri land undir okkum, sigur varaborgarstjórin í Havn*

Enn hevur Tórshavnar býráð ikki viðgjørt uppskotið hjá landsstýrinum um kommunusamanlegging nágreiniliga, men tað kemur á borðið, tí eftir uppskotinum skulu Kvívíkar kommuna og Vestmanna kommuna leggjast saman við høvuðsstaðarkommununi.

Tað skilst, at fleiri býráðslimir ivast í, hvussu rætt tað er at leggja eitt so stórt øki afturat kommununi, sum longu er nógv tann størsta í landinum - bæði í vídd og fólkatali. Ein av teimum, sum ivast, er varaborgarstjórin Jógvan Arge.

### Fleiri samanleggingar

– Tað er so kortsíðani, at vit tóku tríggjar kommunur upp í Havnar kommunu - Nólsoy, Hest og Kirkjubøar kommunu. Okkara royndir eru tær, at tað er ikki ókeypis at víðka kommununa, og tað er ikki í øllum førum til fyrimunar fyri borgararnar í gomlu kommununi, sigur Jógvan Arge.

Fyri seks árum síðani varð Kollafjørður lagdur afturat Tórshavnar kommunu. Tað, sum tá taldi mest hjá býráðnum, var at fáa fjørðin upp í kommununa, so kommunan kundi fáa betri havnarmøguleikar.

Nøkur ár frammanundan var Argir komin uppí. Jógvan Arge sigur, at tað bleiv gjørt av neyð, men samanlegging millum Havnina og Argir var eitt náttúrligt stig, tí kommunurnar vóru samanvaksnar, og nógv av teimum kommunalu tilboðunum hjá argjafólki vóru frá Tórshavnar kommunu.

Undan tí kom eitt nú hoyvíkarparturin av Uttanbíggja kommununi upp í Tórshavnar kommunu.

– Tað var eitt frambrot, sum gjørdi, at Havnin fekk betri pláss at veksa, og ágóðan av hesum tí hava vit sæð tey seinastu mongu árini, sigur varaborgarstjórin. Hann heldur, at tað sama kann sigast um samanleggingina við Kirkjubøar kommunu, tí hetta skuldi givið Tórshavnar kommunu rúmari ræsur í býarmenningini eystan fyri Kirkjubøreyn, sum er eitt náttúrligt stað at byggja høvuðsstaðin út móti Nólsoyarfirði.

### Havnin nóg stór

Samanleggingarnar higartil hava sostatt verið til gagns fyri høvuðsstaðarkommununa, men tá talan er um at leggja Kvívíkar kommunu og Vestmanna kommunu afturat høvuðsstaðnum, er støðan ein heilt onnur, heldur Jógvan Arge.

– Hetta er eitt heilt annað mál. Jú, jú, vit fáa tvær hvalvágir afturat, gamaní, men vit fáa eisini einar 2.000 borgarar afturat teimum 20.000, sum vit hava. Tað ger Havnina nógv størri, enn nøkur onnur kommuna kann hugsast at verða.

Jógvan Arge vísir á, at eitt av endamálunum við samanleggingunum er gjøgnum størri skattainntøkur til hvørja einstaka eind at gera kommunurnar førar fyri at taka fleiri málsøki upp á seg at umsita og reka nærri borgarunum. Hann heldur, at Havnin hevur longu eina hóskandi støðd.

– Tær næststørstu eindirnar kunnu kanska eisini taka meiri upp á seg, men tær smáu eindirnar fara at darla afturút, sigur hann.

### Tvørtur um sundið

Í uppskotinum hjá landsstýrinum verður mælt til, at Vágar verða ein kommuna, sum fer at telja umleið 3.000 fólk. Jógvan Arge heldur, at vórðu Vestmanna og Kvívík lagdar saman við Vágum, so varð tann eindin betur før fyri at umsita fleiri málsøki við útivið 5.000 fólkum at bera byrðarnar.

– Við at leggja Vestmanna og Kvívík saman við Havnini er vandi fyri, at tær drukna í meldrinum í høvuðsstaðarkommununi og verða meiri útjaðari, enn tær eru í dag, sigur varaborgarstjórin.

– Men landsstýrið sigur, at býtið skal gerast eftir landafrøðini?

– Jú, víst eru Vestmanna og Kvívík á somu oyggj sum Tórshavnar kommuna. Men landafrøðin er ikki longur tann, sum hon hevur verið. Fast samband er úr Kvívík vestur í Vágar. Vestmannasund, sum fyrr var ein forðing, er ikki forðing longur. Tvørturímóti skuldi fasta sambandið eggjað til samstarv.

Jógvan Arge heldur, at spurningurin um eina slíka samanlegging vesturi á landinum eigur at verða viðgjørdur út í æsir, áðrenn avgerð verður tikin um at leggja Kvívík og Vestmanna afturat høvuðsstaðnum.

Varaborgarstjórin heldur, at best er, sum er.

– Vit vilja umsita tað, sum vit hava, væl. Vit leggja orku í at hava eina góða og framkomna umsiting at tæna borgarunum og hava nú í áravís bíðað eftir, at relevant málsøki verða løgd út til okkara. So Tórshavnar kommuna hevði óivað líkað betur greiðar linjur millum landið og kommunurnar enn harraboð um bókstaviliga at leggja meiri land undir seg, sigur hann.

*Móttøka*



*Í samband við, at Sofus Clementsen tók við starvinum sum stjóri á Pf. Postverk Føroya 1. oktober 2006, verður almenn móttøka á Frímerkjadeildini, Traðargøta 38, Argir, fríggjadagin 17. november 2006 frá kl. 16.00 til 18.00*

*Nevndin í Pf. Postverk Føroya*

Postverk Føroya